Tórshavn 23 februar 2024

Fylgiskjal 5

Til Umhvørvismálaráðið

Viðmerkingar til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan (Barsilslógin)

Fakfelagssamstarvið hevur hesar viðmerkingar til uppskot um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan – serliga um hækkan av útgjaldshámarkinum og barsilspeningur til nýútbúgvin:

Konkret um uppskotið halda vit, at hetta er eitt gott stig fram á leiðini – bæði tað at útgjaldið hækkar, at nýútbúgvin fáa veruliga atgongd til skipanina, og so sjálvandi eisini tað, at myndugleikaheitið verður kynsneutralt.

Annars halda vit, at principielt eigur útgjaldið altíð at vera tað sama, sum um viðkomandi starvsfólk var til arbeiðis. Sum nú er, kann barsil vera eitt stórt fíggjarligt bakkast fyri tey, sum fáa hægri løn enn úgjaldið, og sum ikki hava rætt til fulla løn undir barsilsfráveru eftir kollektivum sáttmála.

Í øðrum lagi eigur útgjaldið at hækka samsvarandi lønarvøkstrinum á almenna arbeiðsmarknaðinum, hetta fyri at tryggja, at útgjaldið ikki alla tíðina dragnar frá lønarlagnum.

Í hesum sambandi kann eisini nevnast, at vit halda, at í tí nýggju § 20a átti eitt minstamark fyri útgjaldi at verið ásett. Hetta kundi so eisini verið regulerað á sama hátt sum vanligt útgjald.

Ein máti at fáa hetta í fasta legu er at skipa Barsilsskipanina sum ein grunn á sama hátt sum ALS við einum stýri, sum fær heimild til leypandi at justera útgjøldini og aðrar lutir í skipanini. Stýrið kundi í hvørjum einstøkum føri út frá lønarhækkingunum gjørt eina samlaða meting av, hvussu nógv útgjøldini skulu hækka fyri at samsvara við lønarlagið.

Vit halda eisini, at arbeiðast skal alla tíðina fram ímóti, at tað á ongan hátt skal stilla kvinnuna verri, at hon fer á barsil. Sum er, mugu vit ásanna, at kvinnur, sum fara á barsil reelt altíð eru fyri inntøkumissi, so ella so.

LM-092/2023

Tórshavn 23 februar 2024

Vit hava tosað við limafeløgini um hetta uppskotið, og at tað møguliga verður ein broytingartilgongd av Barsilslógini seinni, smb. tekstpettið um "Aðrar ábøtur" á síðu 7 í viðmerkingunum til lógaruppskotið. Feløgini eru sannførd um, at umboð fyri Fakfelagssamstarvið eiga at verða partur av einum møguligum arbeiðsbólki, ið skal endurskoða og dagføra Barsilslógina. Vit meta, at júst hendan uppgávan hjá einum arbeiðsbólki hevði hóskað seg væl at verið skipað sum eitt trýparta-samstarv.

Vegna

Fakfelagssamstarvið